# Fjølbroytt listaframsýning í Runavík

**Málningar frá øllum landinum vóru vístir fram, tá Lions Club í Eysturoy um páskini skipaði fyri árligu listaframsýningini í Runavíkar Skúla.**

LISTAFRAMSÝNING
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Runavík:**
Hetta var 32 árið á rað, at Lions Club í Eysturoy skipaði fyri árligu listaframsýningini.

Samstundis var hetta eisini einasta listaframsýningin í landinum, ið hevði opið um páskirnar.

## Sum heitt breyð

Listarfólk frá øllum landinum høvdu sent tilsamans 346 málningar inn til framsýningina, og millum hesar vóru eisini fleiri væl kend nøvn innan føroyska list. Men hendan framsýning er fyri øll, og tí hingu málningar hjá bæði kendum og minni kendum listarfólki lið um lið yvir allan skúlan. Áhugin fyri árligu listaframsýningini hevur altíð verið stórur, og so var eisini í ár.

- Longu fyrsta dagin vitjaðu 582 fólk framsýningina, og eftir tveir teir fyrstu tímarnar høvdu vit selt eina rúgvu av málningunum, sigur Harley Joensen, formaður í Lions Club Eysturoy.

- Framsýningin í ár er eitt sindur øðrvísi, enn hon plagar at vera, men fólk dáma hana ótrúliga væl. Hetta sæst eisini aftur á søluni, tí málningarnir ganga sum heitt breyð í ár, greiðir formaðurin frá.

Harley fortelur eisini, at framsýningin er ætlað sum eitt slag av sparki tann rætta vegin til nýbyrjarar og onnur, sum ikki hava so góðar møguleikar fyri at stilla út. Tískil er einki eftirlit á málningunum, og hetta sæst eisini aftur.



*Harley Joensen, formaður í Lions Club Eysturoy, millum nakrar av málningunum á framsýningini.*

- Framsýningin er ótrúliga fjølbroytt av tí sama, og okkurt skuldi verið at funnið til einhvønn, sigur hann.

Vanliga plaga um 900 fólk at vitja framsýningina teir báðar dagarnar, hon hevur opið, og hetta talið væntaðu fyrireikararnir eisini at náa í ár.

## Ágóðin til lyftir

Ágóðin frá øllum tiltøkum hjá Lions Club fer til vælgerandi endamál, og so er eisini við framsýningini.

Hesuferð er ætlanin at keypa tríggjar lyftir, sum skulu latast til trý eldrabýli í Eysturoynni.

Hetta eru lyftir, sum kunnu lyfta óhjálpin fólk upp úr seingini, eins væl og tær styðja fólki, ið hava fyri neyðini at læra seg antin at standa ella ganga.

Hesar lyftir koma tilsamans at kosta 60.000 krónur, og verður hetta alt goldið av Lions Club Eysturoy.



*Nógv fólk vitjaðu skúlan í Runavík, tá hann um páskini var karmur um árligu listaframsýningina hjá Lions Club Eysturoy*



*346 málningar vóru útstillaðir, og hingu teir á bróstunum runt allan skúlan.*

# Frændur á palli í Klaksvík

**Lýst var við øsing og propaganda, tá Unga Tjóðveldið fyri fyrstu ferð skipaði fyri eini Free Føroyar konsert í Klaksvík. Hæddarpunkt á konsertini var uttan iva, tá veteranarnir í Frændum fingu salin upp at kóka**

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:**
2. páskakvøld skipaði Unga Tjóðveldið fyri stórari konsert í K.Í. høllini í Klaksvík. Luttakandi bólkarnir vóru Marigold, Flux, Iris, Human Caos, Chain, Side Effect og Frændur.

Um 400 fólk leitaðu sær inn í høllina hetta kvøldið, harav nógv tey flestu vóru ung undir 20 ára aldur.

## Fullveldispropaganda

Hóast lýst var við øsing og fullveldispropaganda í fleiri dagar undan konsertini, so slapst ikki undan, at tónleikurin hetta kvøldið hevði minst líka nógv at siga sum politikkur.

Og luttakandi bólkarnir frá teim ymsu støðunum kring landið syrgdu fyri, at okkurt var til øll. Tónarnir spentu heilt frá nýggjum, hørðum punkrocki til gomlu og vælkendu slagararnar hjá Frændum.

Í høllini kundi ein ogna sær hvítar t-troyggir við greiðum fullveldis-orðingum áskrivaðum, og fleiri av teim yngstu í høllini tóku eisini av hesum tilboðum. Hetta gjørdi, at líka mikið, hvar í høllini tú enn var staddur, so sást tú hvítar stórar troyggjur flákra aftur og fram saman við ljóðfallinum av pallinum.

## Frændur hæddarpunkt

Men einki av hesum kundi máta seg við hýrin á áhoyrarnunum, tá gamli og vælkendi klaksvíksbólkurin Frændur kom á pallin. Hóast tey fægstu av áhoyrarunum munnu minnast Frændur frá teirra tíð á toppinum, so gjørdi tað ongan mun hetta kvøldið.

Saman við løgum sum Føroyar, Lívsmynd og Mítt Land broyttist øll hølin um eitt stórt gildi, og munnu tey flestu fara at minnast til hetta gildið í langa tíð.

Hetta var fyrstu ferð, at limirnir í Frændum hava staðið á palli í langa tíð, men tað gjørdist framførslan ikki verri av. Fólk vóru spent uppá at uppliva teir live enn einaferð, og teir útlivdu eisini allar vónirnar hjá uppmøttu.

## Væl nøgdir

Frá fyrireikarunum í Unga Tjóðveldinum frætta vit, at teir eru væl nøgdir við tiltakið í K.Í. høllini.

- Bólkarnir spældu heilt væl, og vit sóu, at fólk høvdu tað stuttligt, sigur Jóannes Vitalis Hansen, samskipari av Free Føroyar konsertunum.

- Endamálið við hesum konsertum er at stuðla føroyskum tónleiki, meðan vit samstundis hava ein greiðan politiskan boðskap at bera fram. Vit ynskja føroyskt fullveldi, og gjøgnum tónleikin vilja vit savnað fólk saman um eina sjálvstýrishugsjón, sigur Jóannes.

Hugskotið til Free Føroyar stavar frá Prix Føroyar kappingini, og fyrsta Free Føroyar konsertin varð hildin 20. apríl seinasta ár, kvøldið undan finaluni í Prix Føroyar umfarinum.

Konsertin í K.Í. høllini var tann sætta av sínum slag, men væntandi koma vit at síggja enn fleiri runt um landið í framtíðini.



# Hógv selir føroyskar ketlar til Íslands

**- Samráðingar eru eisini við stóran danskan framleiðara um 400-600 føroyskar ketlar, sigur Jákup Olsen, sum leiðir handilsvirkið Hógv í Søldarfirði.**

FRAMLEIÐSLA
*Vilmund Jacobsen*

Handilsvirkið Hógv í Søldarfirði er einasta virki í Føroyum, sum framleiðir ketlar til føroyska marknaðin. Eftirspurningurin er vaksin nógv seinastu, og fyri fáum vikum síðan fóru teir fyrstu ketlarnir til Íslands. Felagið framleiðir nú einar 100 ketlar um árið til føroyska marknaðin.

Tað var Jákup Olsen, sum í 1985 byrjaði einsamallur at gera rørarbeiði og instalera hita fyri fólk, sum bygdu ella skiftu gamla instalatión út við nýggja. Í byrjanini seldi hann útlendskar keltar, men Jákup kom skjótt eftir, at útlendsku ketlarnir vóru dýrari enn neyðugt. Tí fór Hógv undir at framleiða sínar egnu keltnar. Tey fyrstu árini samstarvi felagið við svenska fyritøku og framleiddi keltnar uppá liesens. Men skjótt byrjaðu teir at framleiða sínar egnu keltar.

Jákup eigur Sp/F Hógv saman við øðrum og leiðir virksemið, sum felagið hevur.



*Teir, sum byggja føroysku sniðhúsini, hava enn ikki fingið eyguni upp fyri ketlunum, sum Hógv í Søldarfirði framleiðir, hóast hesir bæði í dygd og prísi væl og virðiliga eru kappingarførir við teir útlendsku.*

## Kreppan

- Tá ið kreppan kom fyrst í nítiárunum, hildu vit tað vera vert at royna okkurt sjálvir, og fóru vit tá undir at gera okkara egnu ketlar.

Jákup sigur, at Hógv ger tvær støddir av ketlum - ein til vanlig sethús og ein størri til virkisbygningar, men konstruktiónin er hin sama.

Hann ásannar, at samstarvið við svensku fyritøkuna legði góðan botn í hjá teimum, soleiðis at teir í dag hava ein ketil, sum í allar mátar er kappingarførur við aðrar ketlar á marknaðinum, bæði í dygd og prísi.

- Síðan vit byrjaðu, er ketilin broyttur og gjørdur betri og betri. Vit hava lært av royndunum og hava í dag tann mest framkomna ketilin á marknaðinum - ein ketil, sum er gjørdur til okkara viðurskifti.

Jákup dylur ikki, at føroyski ketilin er betri enn tann svenski, sum teir gjørdu uppá liesens.

- Ketilin hjá okkum er ein sonevndur rør-ketil, sum er gjørdur úr tjúkri plátum enn vanligur plátuketil, og hann er so orkusparandi, sum ein ketil yvirhøvur kann vera. Í prísi er hann nógv bíligari enn aðrir ketlar við somu konstruktiónum.

Spurdur, hvat tað merkir, at hetta er ein rørketil, sigur Jákup:

- Ketilin er uppbygdur á tann hátt, at roykurin fer ígjøgnum rør og verður avkøldur, aðrenn hann fer upp ígjøgnum skorsteinin. Á henda hátt verður hitin av roykinum nýttur optimalt, soleiðis at minst møgulig orka fer til spillis.

Jákup sigur, at ketilin hevur eitt virkningsstig, sum hann kallar tað, ið er 95%, og tað er sera gott.

- Hetta ger eisini, at ketilin hevur eina nógv reinari forbrenning enn gomlu ketlarnir hava, sigur hann.

## Útlendskur áhugi

Tá ið fiskivinnustevnan var í ítróttarhøllini í Runavík í fjør, vóru eitt nú íslendingar í Føroyum og fregnaðust eftir, hvat føroyingar framleiða.

- Vit vóru ikki við á hesi stevnu, men kortini fingu vit vitjan av íslendskum seljara, sum hevði áhuga í okkara ketlum. Hetta samstarv er nú komið har til, at vit hava leverað teir fyrstu ketlarnar til Íslands, og íslendingar hava biðið um at fáa fleiri yvir, sigur Jákup, sum er sera spentur uppá, hvussu samstarvið við íslendingar um sølu av føroyskum keltum fer at taka seg út, tí markaðurin har yviri er stórur.

Hann vísir á, at føroyski ketilin er væl kappingarførur við ketlarnar, sum eru á íslendska marknaðinum.

Hógv hevur eisini fingið ein sera áhugaverdan fyrispurning úr Danmark.

- Hetta er ein stór verksmiðja, sum framleiðir ketlar. Teir vilja keypa okkara ketlar og selja teir víðari á danska marknaðinum. Danska fyritøkan hevur spurt okkum, hvat vit kunnu selja teimum 400-600 ketlar fyri. So, hetta er ikki smávegis sáttmáli, ið talan er um.

Spurdur, um danska fyritøkan ikki hevur somu ketlar sum Hógv, sigur Jákup, at tað hava teir ikki, og danir meta, at føroysku ketlarnir verða dýrari at framleiða í Danmark enn í Føroyum.

- Vit hava tosað við donsku fyritøkuna í eina tíð um hesi viðurskifti, og mangt bendir á, at okkurt fer at spyrjast burtur úr. Men hetta er ein langsiktað ætlan, tí her er talan um so nógvar ketlar, sigur Jákup.

Hann sigur, at Hógv hevur møguleikar at økja um framleiðsluna av ketlum, men tá verður neyðugt at gera minni av onkrum øðrum.

## Sniðhúsini

Jákup Olsen harmast annars um, at tey feløg, sum byggja føroysku sniðhúsini, yvirhøvur instalera útlendskar ketlar heldur enn føroyskar, sum bæði í prísi og dygd eru kappingarførir.

Spurdur, hví hetta er so, sigur Jákup, at tað er tí, at teir, sum byggja hesi húsini, velja útlendsku ketlarnar fram um.

- Vit hava tosað við einstakar av framleiðarunum, men higartil er so einki hent, sigur Jákup Olsen at enda.

Á Hógv í Søldarfirði arbeiða 6-8 mans.